# Blokkar forða fyri nýggjari samgongu

**Í vikuskiftinum gjørdist greitt, at eingin nýggj samgonga verður skipað í bræði. Eftir at løgmaður hevði boðað Javnaðarflokkinum til realitetssamráðingar gjørdi andstøðan av at skipa seg í bólk**



*Javnaðarmenn á fundi í Tinganesi*

*Mynd: Finnur Justinussen*



*Jenis og Bill á fundi við løgmann*

*Mynd: Finnur Justinussen*



*Sambandið á fundi við løgmann*

*Mynd: Finnur Justinussen*

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR

*Jan Müller*

Eftir fundir við samgonguflokkarnar og við allar andstøðuflokkarnar gjørdi løgmaður seinnapartin leygardagin sína niðurstøðu. Hann skuldi mánamorgunin fara í realitetssamráðingar við Javnaðarflokkin. – Hesa avgerð havi eg tikið við atliti til at fáa eitt breitt parlamentariskt grundarlag undir eitt landsstýri. Tað er neyðugt at fáa breiðan fólksligan uppbakning í tí politikki, sum skal rekast frameftir. Anfinnur Kallsberg, løgmaður segði leygardagin, at hann heldur tað vera ov veikt grundarlag bara at taka Miðflokkin við í hesar samráðingar. –Tað er øgiliga týdningarmikið nú at fáa "ró yvir feltið" sum løgmaður málbar seg og legði hann aftrat, at hann kennir seg hava skyldu til at royna tað.

Løgmaður dylur ikki fyri, at Tjóðveldisflokkurin helst sá eina samgongu eisini saman við Miðflokkinum. Men tað verður so ikki talan um tað mánadagin.

- Hetta eru helst sera truplar samráðingar sum standa fyri framman. Valið var so javnt, at tað er einki, sum er heilt upplagt. Um man ikki dugur sær hógv ella er passaliga diplomatiskur og dugur at tillaga seg, so verður ringt at fáa eina arbeiðsføra samgongu upp at standa. Tað er okkara uppgáva sum politikarar at syrgja fyri at royna at gera tað so trygt og gott sum tað ber til.

## Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin gjørt alliansu

Løgmaður upplýsti eisini leygardagin, at treytin fyri, at Fólkaflokkurin fer í eina samgongu er, at Sjálvstýrisflokkurin eisini er við. - Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava gjørt eina avtalu um at vera saman í samráðingunum um eina nýggja samgongu upplýsti Anfinn Kallsberg løgmaður. Hetta er gjørt fyri at tryggja, at hvørgin av flokkunum fer uttan um hin. Tvs. at fer Fólkaflokkurin uppí eina samgongu, so merkir tað, at Sjálvstýrisflokkurin verður við. Fer Sjálvstýrisflokkurin í eina samgongu, so verður Fólkaflokkurin við. Hetta merkir so aftur, at um talan verður um eina stóra samgongu millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin við 22 tingmonnum, so verður Sjálvstýrisflokkurin eisini við. – Eg havi knýtt Sjálvstýrisflokkin aftrat mær fyri at fáa stabilitet yvir samráðingarnar. Jú fleiri møguleikar eru tess størri útlit eru til at fáa størri taktiskt spæl og harvið minni realitetssamráðingar sum so. Hetta er gjørt fyri, at vit og Sjálvstýrisflokkurin kunnu føla okkum meira fríar í samráðingunum, sum koma segði løgmaður við Portalin og Útvarpið leygardagin. Løgmaður helt tað vera týdningarmikið at forða fyri, at ein flokkur í samgongu kann spæla ein flokk út ímóti einum øðrum í einum øgiligum taktiskum spæli.

–Við at gera hetta avmarki eg nakrar møguleikar fyri at gambla við flokkunum í býti av bæði einum og øðrum. Hetta høvdu allir aðrir møguleika at gera eftir valið segði løgmaður.

## Andstøðan saman

Eftir at hetta kom fram tóku teir tríggir andstøðuflokkarnir seg saman í ein bólk.

– Vit kunnu als ikki góðtaka, at løgmaður setir allar demokratiskar spælireglur til viks í eini roynd at varðveita valdið, segði Jóannes Eidesgaard, við útvarpið leygarkvøldið.

Jóannes Eidesgaard minti enn einaferð á, at vit hava havt løgtingsval.

– Tað tykist, sum um løgmaður hevur gloymt tað. Hann arbeiðir sum um hann roynir at loysa eina samgongukreppu. Men tað er ikki veruleikin. Veruleikin er, at samgongan hevur mist meirilutan, tí kann løgmaður ikki uppføra seg soleiðis, segði Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard heldur, at løgmaður eigur at virða løgtingsvalið.

– Tá løgtingsval hevur verið, eiga vit at vaska talvuna reina og byrja av nýggjum. Men tað kunnu vit bara konstantera, at tað ger løgmaður ikki. Hevði tað verið soleiðis, at samgongan framvegis hevði meiriluta, so var støðan ein onnur. Um løgmaður ikki vil samráðast á einum demokratiskum grundarlag, so heldur Jóannes Eidesgaard, at løgtingsformaðurin eigur at fáa initiativið, so flokkarnir hvør í sínum lag kunnu peika á ein samráðingarleiðara.

Andstøðuflokkarnir sendu sunnumorgunin soljóðandi tíðindaskriv:

Undirritaðu flokkar hava í dag sent løgmanni soljóðandi skriv:

Fráboðan til løgmann

4. mei 2002 boðaði Útvarp Føroya frá, at løgmaður hevði tikið stig til veruligar samgongusamráðingar millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Javnaðarflokkin. Í hesum sambandi boðaði løgmaður frá, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir saman. Somuleiðis varð varaløgmaður endurgivin fyri at siga, at sitandi samgonga fer til samráðingar mánadagin sum ein blokkur upp á 16.

Við virðing fyri løgtingsvalinum 30. apríl 2002 og til tess at fáa javnar samráðingar um eina nýggja samgongu, boða undirritaðu flokkar løgmanni frá, at vit hava valt at standa saman sum ein blokkur, sum telur 16 tinglimir.

Tórshavn 5. mei 2002
Sambandsflokkurin
Javnaðarflokkurin
Miðflokkurin

# ítróttur

Nr. 85 • týsdagur • 7. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Verkfallið hongur yvir kappingini

**Havnarfeløgini fingu beinanvegin skutin framum hini feløgini, sum kunnu roknast sum avbjóðarar í kappingini um FM**



*Rúni Nolsøe fegnast saman við Andrew av Fløtum um tað seinasta málið í 4-0 sigrinum á NSÍ. Saman við B36 kom HB væl frá byrjan í hesum kappingarárinum. TB er tað triðja liðið, sum vann sín fyrsta dyst*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SAMANUMTØKA

*Jóannes Hansen*

Fyrsta umfarið í fótbóltskappingini er av. At allir fimm dystirnir vórðu spældir, var í sær sjálvum ein sigur fyri fótbóltskappingina. Kappingarnevndin kendi seg noydda við stuttum skotbráði at býta fyrsta og sætta umfarið um, og feløgini vístu stórsinni. Tað kom illa við hjá fleiri, at tey ikki fingu at vita um broytingina fyrrenn mikukvøldið ella hósmorgunin, men eingin setti føtur í spenni ímóti, og so er fyrsta umfarið farið.

Spurningurin er nú, hvussu tað verður komandi dagarnar og vikurnar. Longu hósdagin er sambært skipanini annað umfar á skránni. Tá eru dystirnir hesir: EB/Strreymur–VB, TB–B68, HB–KÍ, Skála–B36 og NSÍ–GÍ.

Karl Vidtfeldt er formaður í kappingarnevndini og kappingarstjóri bæði í vaksnamanna deildunum og í yngru deildunum. Hann býr á Sandi og fæst í sínum dagliga yrki m. a. við mjólkaflutning. Tí kennir hann á egnum kroppi støðugt avleiðingarnar av verkfallinum.

– Vit eru í einari torførari støðu. Um verkfallið heldur fram í fleiri vikur, so verður støðan í útjaðaranum meiri ella minni katastrofal, sigur Karl Vidtfeldt, og um fótbóltin sigur hann:

– Á fundi í síðstu viku gjørdu vit av at býta fyrsta og sætta umfarið um. Hetta gjørdu vit fyri at sleppa undan ferðing um Suðuroyarfjørð. Tá vit tóku ta avgerðina, gjørdu vit eisini av, at frá og við øðrum umfari noyddust vit at halda okkum til løgdu skránna. Tað vil siga, at annað umfarið verður spælt hósdagin, og at B68 skal suður til Tvøroyrar, og at VB skal norður til Eiðis. Vágbingar plaga at megna síni viðurskifti, og Niclas Davidsen og toftamenn plaga ikki at vera ráðaleysir. Tað valdast sjálvandi, hvussu veðrið verður. Hann sigur hampuligt veður, og eg vóni, at dystirnir fara at verða spældir, sigur Karl Vidtfeldt, sum eisini veit at siga, at ferðslan fram við Sandoynni – bæði suður og norður gangandi – hevur verið nógv í vikuskiftinum.

## Havnarfeløgini skutin framum

Á vøllinum gekk tað sera væl hjá B36 og HB. B36 var á útivølli í Klaksvík. Har hava teir vunnið fleiri ferðir síðstu árini. Tá ikki serliga sannførandi gongdin síðstu vikurnar verður havd í huga, so var tað ivaleyst við eitt sindur av ampa, at B36 fór til Klaksvíkar, og tí vóru teir so mikið fegnari um, at tað eydnaðist at vinna alt.

HB hevði heimavøll ímóti NSÍ. Í fjør gekk tað væl hjá HB í bólkaumfarinum í steypakappingini. So gekk tað alt annað enn væl í landskappingini. Í fyrsta umfarinum í ár undirstrikaðu Ion Geolgau og hansara menn, at nú ætla teir sær at vera við, har tað gongur fyri seg. Sigurin á NSÍ var sannførandi.

Hósdagin hevur HB heimavøll ímóti KÍ. Eftir taptið ímóti B36 eru klaksvíkingar longu eitt sindur kroystir, tá teir fara í Gundadal. HB er stórfavorittur.

B36 skal aftur í øðrum umfari spæla á útivølli. Um teir fáa fulla úrtøku á Skála hava teir seks stig eftir tveir dystir á útivølli. Tí er møguleiki fyri sonnum toppdysti, tá B36 og HB fara at hittast í triðja umfarinum.

## Kappingarneytarnir snávaðu

Umframt KÍ og NSÍ hevur verið roknað við, at VB, B68 og GÍ fóru at vera millum liðini, sum skuldu kappast um heiðursmerkini og harvið plássini í Europa Cup.

Felags fyri øll hesi fimm liðini var, at tey komu ikki væl frá fyrsta umfarinum. Undantakið er GÍ. Teir fingu ikki fult á Svangaskarði, men javnleikurin kann fara at vísa seg at vera eitt gott úrslit, sjálvt um GÍ tey seinnu árini ofta hevur vunnið á Toftum.

NSÍ eigur hósdagin heimavøll ímóti GÍ, og Jógvan Martin Olsen og hansara menn eiga at kenna trýst á sær.

B68 skal suður á Sevmýri. TB fekk fult ímóti VB. VB skal norður til Eiðis, har heimaliðið hevur trý stig eftir sigurin á Skála. Tað er møguleiki fyri, at tvey av teimum, sum undan kappingini hava verið nevnd sum kandidatar til botnplássini, kunnu hava fulla úrtøku eftir tvey umfør, meðan tvey av liðunum, sum hava verið nevnd sum møguligir kandidatar til fremstu plássini, kunnu standa uttan sigur eftir tvey umfør.

## Steypakappingin

Største hóttanin hjá øllum feløgunum er í løtuni verkfallið, men FSF hevur, sum omanfyri nevnt, gjørt av, at tað skal spælast sambært skránni.

Skráin sigur, at steypadystir eru á skránni sunnudagin. Tá skulu NSÍ og B68 spæla fyrru hálvfinaluna. Hon verður í Runavík.

Dysturin millum VB og EB/Streym varð ikki spældur, tá hann skuldi spælast. Eftir at VB hevur verið á Eiði hósdagin, skal EB/Streymur til Vágs sunnudagin at spæla fjórðingsfinalu. Vinnarin av tí dystinum skal spæla hálvfinalu ímóti HB. Nær teir dystirnir skulu spælast er ikki avgjørt enn, men tað er avgjørt, at finalan skal verða spæld á ólavsøku.

Og so mugu vit – saman við Karl Vidtfeldt, fótbóltsfeløgunum og øllum hinum – vóna, at verkfallið skjótt verður av, so allar forðingar fyri at halda seg til løgdu skránna detta burtur.